Eivind bleiv vrakaður

Á aðalfundinum hjá hondbóltssambandin um leygardagin var Niels Pedersen í Vestmanna valdur til nýggjan formann. Fyrrverandi formaðurin, Eivind Jacobsen, bleiv ikki skotin upp aftur til formansstarvið

FORMANSSKIFTI

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Niels Pedersen, sum her handar VÍF-liðskiparanum, John Zachariasssen, FM-steypið, er nýggjur formaður í hondbóltssambandinum.
Mynd: Jens Kr. Vang

Millum hondbóltsáhugaðar føroyingar hevði tað leingi ljóðað, at aðalfundurin hjá HSF í ár kundi gerast rættuliga rokaligur, tí at feløgini vóru rættuliga ónøgd við nógv viðurskifti í hondbóltssambandinum.

Stór ónøgd við fyrrverandi formannin

Fundurin gjørdist tó ikki serliga rokaligur. Uppmøtingin til fundin var góð, og øll feløgini høvdu sent umboð á fund, og tilsamans vóru fleiri enn 30 fólk á fundi.

Tá ið formansvalið var á skránni, var bert tað eina uppskotið, nevnliga fyrrverandi varaformaðurin Niels Pedersen úr Vestmanna. Eingin skeyt fyrrverandi formannin, Eivind Jacobsen, upp, og Niels Pedersen bleiv tí einmælt valdur til nýggjan formann. Eivind Jacobsen hevði ikki boðað frá, at hann ikki stillaði upp aftur, og tí kann hetta bert tulkast sum, at feløgini ikki vildu hava hann aftur.

Eftir formansvalið var varaformansvalið á skránni, og tá var aftur bert tað eina uppskotið. Formaðurin í SÍF, Eina Gudmundsen, bleiv skotin upp, og hon bleiv vald uttan mótvalevni.

Hini fólkini í starvsnevndini hjá HSF eru Niels Petur Bech, Svein Rógvi Nielsen og Kristian Johansen, sum er nývaldur. Tiltakslimur er Ingi Olsen.

Nýggi formaðurin sigur, at hann stillaði upp til formann til frama fyri føroyskan hondbólt.

- Tað var stór ónøgd við farna formannin, og tí stillaði eg upp. Fyrrverandi formaðurin vildi hava alt undir sær, og hetta gjørdi, at fólk høvdu ilt við at støðast í starvsnevndini, sigur Niels Pedersen.

Øll fáa ábyrgd

Niels Pedersen sigur, at fremsta uppgávan verður at fáa fólk at trívast í nevndini, soleiðis at tað verður ein ávísur stabilitetur í starvsnevndini.

- Ætlanin hjá mær er at fáa loyalitet í starvsnevndini, og øll skulu vita, hvat ið fer fram í hondbóltssambandinum. Vit fara eisini at gera eitt arbeiðsbýti, soleiðis at allir nevndarlimirnir fáa ábyrgd. Hetta kann vónandi skapa eitt støðufesti í nevndini, sigur nýggi formaðurin.

Niels Pedersen sigur, at nýggja starvsnevndin hjá HSF fer at hava sín fyrsta fund komandi hóskvøld, og tá fer nevndin endaligt at skipa seg. Formaðurin sigur seg vóna, at feløgini fara at stuðla nýggju nevndini, tí sum hann málber seg, so eru tey arbeiðsgevarar hjá hondbóltssambandinum.

Klaksvíkingar ætlaðu, at tað bara skuldi rógvast á túsundmetra málinum á norðoyastevnu, men hesum tók aðalfundurin ikki undir við

Hannis heldur fram sum formaður

RSF aðalfundurin tók ikki undir við 8. FM stevnuni og at tað bara verður róð á styttsta teininum í Klaksvík

KAPPRØÐUR

Jóannes Hansen

Á aðalfundi í Róðrarsambandi Føroya, RSF, varð 2. hvítusunnudag samtykt, at ein nýggj FM kapping skal vera á skránni í ár. Tað vil siga, at nú fer at verða kappast um sjey FM heiti og ikki seks. Nýggja kappingin kemst av, at genturóðurin verður flokkaður í aldursbólkar. Á sama hátt, sum tað hjá dreingjunum er 18 ára aldursmark, verður tað eisini hjá gentunum 18 ára aldursmark soleiðis, at tað nú verður ein kapping millum 5-mannafør við gentum, sum eru yngri enn 18 ár og ein fyri gentur, sum eru eldri enn 18 ár.

Fuglfirðingar og tey í Runavík vildu hava aðalfundin at samtykkja, at talið á FM stevnum skuldi hækka úr sjey og upp í átta. Tað vildi aðalfundurin ikki. Meginsjónarmiðið var, at tað er ov stutt frá Norðoyastevnu og til Ólavsøku at kappast fleiri enn sjey ferðir.

Klaksvíkingar vildu hava fundin at góðtaka, at tað á Norðoyastevnu í ár bara skuldi kappast á 1000 metrum. Tað vildi fundurin ikki taka undir við.

Argja Róðrarfelag og Knørrur vildu hava fundin at taka undir við, at hesi feløgini skuldu eiga lut fyrireikingunum av ólavsøkuróðrinum. Fundurin vísti málinum frá sær.

Róðrarsambandið legði fyri fundin uppskot um heimild at taka FM stig frá manningum, sum ikki nýta bjargingarútgerð undir venjing. Tað vildi fundurin ikki.

Á fundinum var nevndarval. Allir sjey nevndarlimirnir stóðu fyri vali, og tveir nevndarlimir, skrivarin og kassameistarin, sum ávikavíst vóru Sjúrður Gullbein og Dánjal Petur Poulsen høvdu boðað frá, at teir tóku ikki við afturvali.

Hannis Joensen, sum hevur boðað frá, at hansara skeið í RSF formanssessinum fer at styttast, varð afturvaldur til formann, og Jan Herman Hansen varð afturvaldur til næstformann. Nýggjur kassameistari er Dánjal Petur Olsen, sum frammanndan var nevndarlimur. Nýggjur skrivari er Paula Eikholm, sum er nývald í nevndini. Hans David Hansen er nevndarlimur, og Poul John Æðustein er nývaldur nevndarlimur.

Kvinnukappingin broytt munandi

Á aðalfundinum hjá HSF leygardagin var eitt broytingaruppskot fyri kvinnukappingina samtykt. Uppskotið fer at hava við sær, at kvinnurnar í framtíðini fara at spæla hálvfinalu og finalu

BROYTINGAR Í HONDBÓLTSKAPPINGINI

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Nógv hevur verið kjakast um kvinnukappingina í vetur, men nú hevur aðalfundurin hjá hondbóltssambandinum samtykt nakrar broytingar, sum skulu gera kappingini meiri áhugaverda.

Tvey lið flyta niður

Tá ið kappingin hjá kvinnunum fer av bakkastokki aftur í heyst, verða liðini í deildini átta í tali, sum tey eisini vóru farna kappingarár. Hesi átta liðini spæla eitt grundspæl, har liðini fáa 14 dystir hvør.

Grundspælið verður liðugt á jólum, og tá verður deildin býtt í tveir bólkar. Í báðum bólkunum byrja liðini aftur á 0 stigum.

Ovari bólkurin spælir síðani um at gerast nummar 1,2,3 og 4 í endaspælinum. Liðini spæla tvær ferðir móti hvørjum øðrum, og tá ið endaspælið er av, eru hálvfinalur á skránni.

Liðið, ið endar nummar eitt í endaspælinum, skal dystast við nummar fýra, meðan lið nummar tvey og trý bresta saman. Í hálvfinalunum verður spælt best av trimum dystum, og tað liðið, ið endaði ovast í endaspælinum hevur heimavøll í triðja dystinum, um neyðugt verður við einum triða dysti.

Vinnararnir av hálvfinalunum báðum hittas so í finaluni, og aftur her verður talan um best av trimum dystum, og eisini her fær ovara liðið í endaspælinum fyrimunin av heimavølli í einum møguligum triðja dysti.

Niðari bólkurin spælir á sama hátt sum ovari bólkurin, men tá ið teirra endaspælið er liðugt, flyta tey bæði niðastu liðini beinleiðis niður í næstfremstu deildina.

Hetta merkir, at tá ið kappingarárið 2006/2007 fer av bakkastokki um gott og væl eitt ár, eru tað einans seks lið í fremstu kvinnudeildini. Men tá ið grundspælið tá endar, koma tvey tey fremstu liðini úr næstfremstu deildini at dystast við tvey bæði niðastu úr fremstu deildini um upp og niðurflyting.

Menninir fáa finaludyst

Tað er ikki bert kappingin hjá kvinnunum, ið verður broytt til komandi kappingarár. Eisini manskappingin verður broytt nakað

BROYTINGAR Í KAPPINGINI

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Aðalfundurin hjá hondbóltssambandinum var tó samdur um, at kappingin hjá monnunum var góð í verandi líki, og tí er talan ikki um tær stóru broytingarnar.

Spæla um gullið og bronsuna

Spælt verður framvegis á sama hátt við einum grundspæli, har øll seks liðini spæla tvær ferðir móti hvørjum øðrum.

Síðani verður farið undir endaspælið, og vanligt hevur verið, at tá ið endaspælið er liðugt, er kappingarárið eisini liðugt, og liðið, ið endaði ovast í endaspælinum, er føroyameistari.

Men soleiðis verður ikki framyvir. Tá ið endaspælið endar, skulu tey bæði fremstu liðini spæla um gullið.

Talan verður um eina finalu, har spælt verður best av trimum dystum, og liðið, ið endar ovast í endaspælinum, hevur fyrimun av heimavølli í triðja dystinum, um neyðugt er við trimum dystum.

Somuleiðis skulu nummar trý og fýra spæla um bronsuna, og her verður sami leistur nýttur, sum finalan verður spæld eftir.